FRAMTAK
FRAMTAKSGRUNNUR FØROYA

# Ráðgevi

Framtak bjóðar áhugaðum at søkja fjølbroytt og spennandi starv sum ráðgevi. Tú kemur í tøttum samstarvi við stjóran at arbeiða við vinnuligum menningarætlanum og verða við til at menna Framtak til ein virknan íleggjara í føroyskt vinnulív.

**Arbeiðsuppgávur**
- Fyrireika tilfar til nevndina fyri Framtak
- Samskifta við umsøkjarar, eftirkanna og meta um umsóknir og virði
- Menna sáttmálar og avtalur
- Samráðingar
- Uppfylging av gjørdum íløgum
- Fíggjarstýring
- Samskifti við vinnu og íleggjarar
- Vera nevndarlimur í feløgum, grunnurin eigur í

**Førleikar**
Umsøkjarin skal hava:
- hóskandi útbúgving frá hægri læru-stovni
- góð evni at greina, gott yvirlit og evni at raðfesta uppgávurnar
- góðan málsligan førleika á føroyskum og enskum
- edv-kunnleika, í minsta lagi á brúkara-støði
- góð samstarvsevni og evni at arbeiða sjálvstøðugt

Vit vænta, at tú ert framsíggin og opin fyri at finna loysnir. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan løgfrøði og/ella búskap frá privata ella almenna arbeiðs-marknaðinum.

**Setanartreytir**
Starvið er fulltíðarstarv. Setanarviðurskifti og løn verða ásett eftir avtalu.

Umsókn við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. januar 2007.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Gloriu Kalsø, forkvinnu, á telefon 315623 eftir kl. 17.00 ella Niels Dann West, stjóra, á telefon 315966 ella um teldupost ndw@framtak.fo.

Umsóknin skal sendast til:
Framtaksgrunnur Føroya
Bøkjarabrekka 9
Postboks 3157
110 Tórshavn

**Um Framtak**
Framtak skal eftir marknaðartreytum hava ein virknan leiklut sum kveikjari í føroyskum vinnulívi. Endamálið hjá Framtak er at virka fyri at menna og fjøltáttað føroyskt vinnulív samfelagnum at gagni. Framtak er vinnurekandi grunnur, sum eftir marknaðartreytum veitir framtakskapital við at seta partapening í og/ella veita ábyrgdarlán til nýggjar fyritøkur og eldri fyritøkur, sum víðka um virksemið, skulu endurreisast og/ella ganga nýggjar leiðir.

Gjøgnum sítt virksemi sum vágafúsur og tolin íleggjari hevur Framtak møguleika at menna vinnur, har nýskapan og langtíðarætlanir eru neyðugar, og fíggjarligi vinningurin er frammi í tíðini.

Framtak samstarvar við aðrar fíggjarligar íleggjarar at lyfta í felag, har váðin er stórur.

Starvslýsing

# Leiðari til Verkhúsið Virkni

## Farloyvisstarv

Starvið sum leiðari fyri Verkhúsinum Virkni er leyst at søkja til setan 01.01.2007 ella eftir nærri avtalu. Setanin er tíðaravmarkað og endar 31.12.2007.

**Verkhúsið**
Verkhúsið Virkni er eitt dagtilboð fyri vaksin fólk, sum eru menningartarnað. Talan er um fólk, sum hava stóran tørv á stuðli og hjálp í gerandisdegnum. Undir Verkhúsið Virkni hoyrir eisini Dagtilhaldið við Hoydalsvegin. Dagtilhaldið er eitt tilboð til eldri fólk við menningartarni.
Umleið 30 brúkarar eru á verkhúsinum.
15 fólk starvast á verkhúsinum.
Umleið 8 brúkarar eru á dagtilhaldinum.
2 fólk starvast á dagtilhaldinum.

**Starvið**
Leiðarin hevur ábyrgdina fyri saman við starvsfólkunum at skipa ein tryggan og stimbrandi gerandisdag fyri brúkararnar.
Leiðarin hevur ábyrgdina fyri dagliga rakstrinum av stovninum. Hetta umfatar fakliga, fyrisitingarliga og fíggjarliga ábyrgd.
Leiðarin fyri verkhúsinum vísir til leiðaran fyri Trivnaðartænastuna, sum er deild undir Nærverkinum.

**Um leiðaran**
Tú skalt hava eina viðkomandi útbúgving so sum pedagogur, ergoterapeutur ella líknandi. Harumframt mást tú hava hug og hegni til at arbeiða við fólki, sum hava menningartarn.
Vit vænta av tær, at tú hevur hug og hegni til at leiða, og at tú við tínum leiðsluhátti megnar at skapa trivnað og menning í starvsfólkabólkinum og á verkhúsinum sum heild.

Vit vænta, at tú hevur skil fyri roknskaparhaldi, og at tú hevur hug og áræði at leggja afturat tínari vitan tað, sum krevst, fyri at kunna røkja leiðarastarvið til fulnar.
Vit vænta, at tú ert sjónlig/ur í tínum leiðarastarvi, og at tú dugir væl at lýsa tíni sjónarmið fyri øðrum.
Endiliga vænta vit, at tú hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir, og at tú hevur evni og vilja til at samstarva við starvsfelagar og leiðslu á øllum økjum.

**Setan og løn**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.
Um pedagogur, ið framanundan er tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag á lønarstigunum 42, 44 og 46.

**Umsókn**
Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú venda tær til Jónu Olsen, virkandi deildarleiðara, á tlf 304020.

Umsóknir við próvskjølum, viðmælum og CV skulu sendast til:
Nærverkið
Meginskrivstovan
Eirargarður 2, 2. hædd
FO-100 Tórshavn

**Umsóknarfreistin** er fríggjadagin 26. januar 2007.

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

sansir.fo

**www.naerverk.fo**

# ÚTSØLA

**Vetrarútsølan í SMS byrjar mánamorgunin 8. januar kl. 10 og heldur fram til leygardagin 20. januar.**

SMS